# NEVNDARFRÁSØGN 2018

## REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP



# UM FELAGIÐ

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) er felag fyri reiðarar av føroyskum handilsskipum.

Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum farmaskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna. RFH er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Hesi seinnu árini er felagið og virksemi í felagnum munandi vaksið og telur í dag 19 limir umboðandi 75 skip.

## Í nevndini í RFH sita:

**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**

**Hentzar Steingrímsson, næstformaður**

**Gunnbjørn Joensen**

**Rúni V. Poulsen**

**Jónas Sigmarsson**

**Sjúrður Johansen**

**Bogi P. Nielsen**

## Yvirlit yvir limirnar:

All Oceans Logistics Sp/F

Bal-Bulk P/F

Bakkafrost Farming

Faroe Ship P/f

Frakt & Sand Sp/f

Furesea Sp/f

Mariner Sp/f

Nolsø Shipping Sp/F

Northern Shipping Sp/f

Samskip P/f

Sandgrevstur P/F

Silver Liner Faroe Islands Sp/f

Skansi Offshore

Skipafelagið NorLines Sp/f

Smyril Line P/F

SVITZER Faroe Islands P/F

Thor P/F

Thun Sp/F

Tindhólmur

# FELAGIÐ Í TØLUM

Shipping sum vinnugrein fevnir um ógvuliga fjølbroytt virksemi sum ofta verður býtt upp í deepsea, shortsea og offshore. Vinnugreinin fevnir ikki einans um farmaflutning, men heldur ber til at at siga, at vinnugreinin fevnir um allan flutning á sjónum í heila tikið.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip broytti orsakað av hesum á heysti í fjør navn til Reiðarafelagið fyri Handilsskip, tí hetta varð mett at vera meira umboðandi fyri virksemi hjá felagnum.

Í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip (RFH) eru nú 19 limir, sum umboða 75 skip og eina samlaða tonnagu á uml. 320.000 BT. Limirnir eru virknir innan m.a. siðbundnan farmaflutning, ferðafólkaskip og tænastuskip innan alivinnuna og  innan oljuvinnuna. Afturat hesum fevnir shipping eisini um alt tilknýtt virksemi á landi.

Ikki øll skipini í RFH eru skrásett í FAS, men tó er hetta galdandi fyri meginpartin. Nú talið av skrásetingum í FAS er meira støðugt, ger tað sama seg sostatt eisini galdandi fyri limatalið í RFH.

At ein stórur partur av reiðaríunum, sum hava skip í Altjóða Skipaskránni, lata seg umboða í RFH, fegnast nevndin um, tí tað hevur týdning at vinnan stendur saman um at fáa vinnugreinina fram á leið, soleiðis at hon alsamt gerst ein størri og týdningarmiklari partur av føroyska vinnulandslagnum.



## SHIPPINGVINNAN Í FØROYUM

Shippingvinnan er ikki einans tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men heldur at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at serliga stóru konjunktursveiggini, sum eyðkenna føroyska búskapin, verða javnað við eini slíkari vinnugrein.

Júst tí er tað so týdningarmikið, at dentur verður lagdur á, at fremja shipping sum vinnugrein í Føroyum.

Sum sæst á stabbamyndini niðanfyri, so eru eisini á landi rættuliga fitt av starvsfólki, sum eru tengd at vinnugreinini. Mett verður, at yvir 300 fólk á landi hava sín vinnuveg í einum reiðaríi, sum er limur í RFH, og hetta eru gott 10% fleiri enn í 2018.

Á sjónum er talan um knapt 1.500 sjófólk, sum er nakað meira enn í 2018. Av hesum eru umleið 600 føroyingar, knapt 350 úr hinum norðanlondunum og knapt 550 aðrastaðni frá. Sum sæst á myndini niðanfyri, so sæst samlaði vøksturin av sjófólki ikki aftur í talinum av føroyskum sjófólki. Helst kemst hetta av, at arbeiðsloysið í Føroyum er sjáldsama lágt, so tað eru ikki nógvir føroyingar tøkir at fáa í starv, og tí verða reiðaríini noydd at leita eftir øktari arbeiðsmegi aðrastaðni. Harafturat eru avbjóðingar við at finna t.d. fulltiknar dekkarar, sum eru føroyingar. Tó ber til at siga, at vøksturin á sjónum, gevur arbeiði til fleiri fólk á landi í Føroyum.

Staðfestast kann, at um Føroyar skulu vaksa sum shippingland, so er ongin møguleiki at gera hetta uttan útlendsk sjófólk. Hetta er galdandi í Føroyum á sama hátt, sum hetta er galdandi í londunum kring okkum.








## SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag hava øll uppsagt teirra sáttmálar við Reiðarafelagið fyri Handilsskip.

Talan er um tilsamans nýggju sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnu.

Partarnir hava handa krøv hvør til annan, og samráðingarnar eru byrjaðar. Tey trý manningarfeløgini samráðast saman hesaferð. Vónandi eydnast at koma á mál við samráðingunum, áðrenn sáttmálarnir ganga út.

## TILTØK UM SHIPPING

Síðan aðalfundin í 2018 hevur verið sjóneykan í størri mun enn vanligt verið sett á shipping í Føroyum. Hetta er at fegnast um, og vónandi er hetta tekin um, at shipping verður meira eyðsæð sum ein nýggj stór vinnugrein í Føroyum.

Hin 19. oktober í fjør luttóku Bogi P. Nielsen, stjóri á Faroe Ship og nevndarlimur í RFH, og Esther Dahl, skrivari hjá RFH, á Arctic Circle í Reykjvík. Talan var um eitt tiltak, sum Javnaðarflokkurin á Fólkatingi skipaði fyri undir heitinum Shipping & Business in an Interconnected North. Bogi tosaði undir heitinum "Shipping in and around the Arctic", og Esther tosaði undir heitinum "The Faroe Islands: A Small Place For Big Business".

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið skipaði hin 15. november fyri sjóvinnutiltaki í Sjóvinnuhúsinum, har endamálið var at hyggja eftir, hvussu hevur gingist við at seta í verk Sjóvinnupolitikkin frá 2017. Á tiltakinum høvdu viðkomandi áhugapartar innlegg, og vegna RFH legði formaðurin Jens Meinhard Rasmussen undir yvirskriftini "Hví FAS og eyðkenni við skipavinnu" fram sínar tankar á økinum. Tiltakið var væleydnað, og RFH heldur, at hetta eigur at verða endurtikið í 2019, gjarna við fleiri luttakarum og á meira almennum støði.

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi skipaði aftur fyri tiltaki um shipping tann 30. januar í ár. Hesaferð í Løkshøll í Runavík. Heiti á tiltakinum var "Mitt í sjónum: Føroysk Shippingvinna". Her luttók Jens Meinhard Rasmussen  við einum innleggi undir heitinum "Shipping og virðisskapan í Føroyum", og Bogi P. Nielsen luttók við einum innleggi undir heitinum "Farmaflutningur í Norðuratlantshavinum".








# TÝDNINGURIN AV ALTJÓÐA SÁTTMÁLUM OG MARKNAÐARATGONGD

Shipping er ein altjóða vinna. Tað hevur tí stóran týdning, at bæði vinna og myndugleikar fylgja við altjóða rákum og altjóða sáttmálum, soleiðis at føroysk skip altíð lúka tey krøv, sum verða sett altjóða.

Kappingarneytarnir hjá føroyskari shipping eru ikki í Føroyum, men um allan heimin.

Tað hevur tí týdning, at arbeitt verður ímóti, at serlig national krøv verða gjørd. RFH hevur ta grundleggjandi støðu, at vit eiga ikki at hava serlig national krøv í Føroyum. Okkara altjóða kappingarføri er treytað av, at okkara skip sleppa at virka undir somu reglum sum tey skip, vit kappast við, og at vit hava atgongd til somu marknaðir.

RFH er av hesi orsøk limur í altjóða reiðarafelagsskapinum International Chamber of Shipping, sum m.a. virkar fyri, at shipping um allan heim arbeiðir undir somu treytum. Tað vil siga, at national serkrøv eiga ikki verða gjørd innan hesa vinnugrein.

Føroyska shippingvinnan hevur ikki ynskir um at fáa lagaligar treytir at virka eftir her heima. Tað, vinnan ynskir, er júst altjóða krøvini, hvørki meira ella minni.

## SKULU FYLGJA ATLJÓÐA KRØVUM

Í Sjóvinnupolitikkinum frá 2017 er eitt av tilmælunum, at "Føroya sjóvinnulóggávan eigur framhaldandi at verða dagførd samsvarandi altjóða krøvum, tí hetta er ein fortreyt fyri, at skip undir føroyskum flaggi yvirhøvur kunnu virka á altjóða marknaðinum."

Harafturat verður sagt, at nóg mikið av umsitingarligari orku eigur at vera til hetta arbeiði, og at vit eiga at vera varin at seta national serkrøv í gildi.

Tað eru serliga altjóða sáttmálar hjá International Maritime Organisation, IMO, og International Labour Organisation, ILO, sum stýra treytunum fyri altjóða shipping.

At tað í sjóvinnupolitikkinum verður víst á hesi viðurskifti er av stórum týdningi. Hetta er eitt tekin um, at landsstýrið kennir virðið av at varðveita kappingarførið hjá vinnuni altjóða. Eisini er hetta týdningarmikið í mun til, at føroysk skip møta somu krøvum í Føroyum, sum tey møta uttanlands, soleiðis at tey til eina og hvørja tíð eru før fyri at liva upp til altjóða krøvini.




**MUGU HAVA BETRI MARKNAÐARATGONGD**

Tað er gott, at føroyskir myndugleikar leggja seg eftir altið at vera dagførd í mun til altjóða ásetingar. Tað hevur tó eisini týdning, at Føroyar eisini hava atgongd til somu marknaðir sum kappingarneytarnir.

Okkum tørvar m.a. fleiri dupultskattaavtalur og avtalur um cabotagusigling í Europa. Føroysk skip eru avmarkað í kappingini, tí at kappingarførið verður ov ringt orsakað av  manglandi avtalum millum Føroyar og onnur lond. Okkum tørvar avtalur um cabotagusigling við fleiri lond, t.d. Frankaríki og Spania, og okkum tørvar dupultskattaavtalur við fleiri lond, t.d. Írland og Pólland.

Hetta er bara fyri at nevna nøkur lond. Á sama hátt sum handilsavtalur hava týdning fyri tær fyritøkur, sum inn- og útflyta vørur, hava avtalur um t.d. cabotagusigling og dupultskatt týdning fyri shippingvinnuna. Tí má landsstýrið seta orku av, so tað á hesum økinum verður komið munandi longri fram á leið.



# LÓGARBROYTINGAR SÍÐAN SEINAST

Sum nevnt omanfyri tekur RFH undir við, at Føroyar fylgja altjóða sáttmálum. Tí verður eisini tikið undir við lógarbroytingum, sum eru ein avleiðing av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi. Flestu lógir og kunngerðir, sum verða sendar til hoyringar, eru avleiðing av okkara altjóða bindingum, og tá hevur RFH sjálvdan viðmerkingar til uppskotini.

Øll hoyringssvarini eru annars at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo

Løgtingslóg um mynstring varð send til hoyringar í januar 2018. RFH hevði ikki aðrar viðmerkingar til hesa enn, at lógin ikki máttu leggja tyngri umsitingarligar mannagongdir og byrðar á vinnuna. Í december 2018 var so ein útgreinandi kunngerð um mynstring við heimild í nýggju mynstringarlógini send til hoyringar. RFH hevði ikki viðmerkingar til kunngerðina.

RFH hevði heldur ikki viðmerkingar til uppskot til kunngerð um førleikakrøv til manning við skipum sum sigla í pólhøvum og uppskot til kunngerð um serlig førleikakrøv til manning við skipum fevnd av IGF-koduni, sum vórðu sendar til hoyringar í mars 2018.

Í juni vórðu fýra nýggjar kunngerðir, sum vóru ein avleiðing av Manila avtaluni undir IMO, sendar RFH til hoyringar. Manila avtalan er ískoyti til STCW-sáttmálan. RFH hevði ikki stórvegis viðmerkingar til hesar kunngerðir.

Í august 2018 varð kunngerð um sigling við ferðamannaskipum, ið sjóseta smærri bátar við ferðafólkum send til hoyringar. Endamálið við kunngerðini var at seta treytir og reglur fyri smærri bátar, sum verða sjósettir av ferðamannaskipum. RFH tók undir við hesi kunngerð.

Í december 2018 kom uppskot til kunngerð um siglingarbøkur. Hesa kunngerðina hevði RFH ongar viðmerkingar til.

Afturat hesum vinnugreinaserligu hoyringssvarum er RFH partur av teimum yvirskipaðu hoyringssvarum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag gevur á vinnu- og arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum.







# SAMANUMTIKIÐ

Samanumtikið er at siga, at tað áhaldandi er neyðugt at tryggja kappingarførið og marknaðaratgongdina hjá føroyska handilsflotanum og shippingvinnuni.

Tann parturin av hesum, sum er at leggja seg eftir altið at vera dagførd í mun til altjóða ásetingar, taka føroyskir myndugleikar sær væl av. Føroyar eru dagførdar á flest øllum økjum, og vit halda okkum fyri tað mesta frá at gera serliga nationalar ásetingar í okkara lógum og kunngerðum.

Tað hevur tó eisini týdning, at Føroyar eisini hava atgongd til somu marknaðir sum kappingarneytarnir, og her saknar Reiðarafelagið fyri Handilsskip, at meira verður gjørt frá politiskari síðu. Serliga eru tað dupultskattaavtalur og avtalur um cabotagusigling, sum mangla millum Føroyar og onnur lond.

Vit mugu framhaldandi luttaka aktivt í teimum altjóða fora, sum viðgera og hava týdning fyri shippingøkið, og vit mugu lokalt og í millumlanda samstarvi arbeiða fyri at fáa tær avtalur, sum eru neyðugar fyri, at føroysk shippingfeløg hava atgongd til somu marknaðir sum kappingarneytarnir.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip fer framhaldandi at gera sítt til, at korini hjá føroyska handilsflotanum og hjá føroyskari shippingvinnu batna, soleiðis at vit sum frá líður veruliga koma á heimskortið sum shippingtjóð.

**1. februar 2019**
**Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip**
**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**





## REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP

*Adressa*
Óðinshædd 7
*PO Box 1038*

***Telefonnummar***
298 309900

***Teldupostur***
esther@industry.fo

***Fartelefon***
298 739908

***Heimasíða***
www.industry.fo